

*– Í Føroyum sigur man t.d., at hann er babbasa drongur, um onkur fer upp í eitt familjufirma, sigur Christian Nagata*

Christian undirstrikar, at tað týdningarmesta tilfeingið í Nema er starvsfólkið, og tí heldur hann tað eisini vera umráðandi, at fólk vinna sær royndir uttanlands.

– Eg vil heldur ráða fólki at fara uttanlands - at fara til t.d. London – enn at koma at arbeiða á Reproz beint eftir lokna útbúgving, sigur Christian, og sipar til hvussu týdningarmikið tað er við royndum frá fyritøkum uttanlands.

## Føroyar broyttar

– Eg haldi, at vit eru heppin at liva í eini tíð, har opinleikin ræður. Nú er tað »loyvt« at tjena pengar, sigur Christian, sum heldur at føroyska samfelagið er nógv broytt, síðani hann fór hiðani niður at lesa seinast í áttatiárunum.

– Eg haldi, tað er globaliseringin, er Christian skjótur at svara, tá hann verður spurdur um orsøkina. Hann minnir á, at vit kanska høvdu hug at smílast at íslendingum, tá tað ljóðaði, at tað byrjaði at ganga illa hjá teimum, og at vit eisini høvdu hug at flenna, tá danir eisini fóru at siga hetta um íslendingar.

Men hetta hevur enn ikki víst seg at vera rætt, og Christian heldur, at íslendingar í dag hava prógvað, at sjálvt um man er ein lítil tjóð, so ber til at seta sær stór og altjóða mál.

Hann metir ikki, at støðan í dag í Føroyum, kann metast við áttatiárini.

– Tey, sum halda tað, hava ikki skilt føroyska búskapin, sigur Christian og minnir á, at vit nú hava fleiri bein at standa á. Ikki tí, onkur endar við at fara á heysin, metir hann, men tað verður ikki alt samfelagið.

Christian metir KT-vinnuna sum eina serstaka vinnu, av tí at hon er sera fjøltáttað og verður brúkt í øðrum vinnum umframt at vera ein vinna í sær sjálvum.

– Tey ungu skilja betur KT, enn vit gomlu, sigur Christian, sum enn er í 30'unum.

– Tað er kanska tað einasta, tú kanst sita í Føroyum og framleiða, ið kann brúkast aðrastaðni, uttan at tú noyðist at gjalda flutningsútreiðslur, og harvið ert tú ikki fyri mismuni, tá ið tú kappast við hini á marknaðinum.

## Fólk og førleikamenning

Christian viðgongur, at møguleikin at vinna pening er størri í L.A. enn í Føroyum. Men tað er stuttligari her, sigur hann, og sipar til tað at byggja eina fyritøku upp. Hann vil vera við, at sjálvandi er tað gott at kunna forsyrgja síni familju og sleppa at ferðast viðhvørt, men annars eru pengar ikki nakað endamál í sær sjálvum.

Í KT-vinnuni er sum nevnt hørð kapping um fólkið, og Christian hevur sett sær fyri at fáa tað besta fólkið at arbeiða hjá sær.

– Hjá okkum er ólógligt at siga, at okkurt er gott nokk - tað skal verða perfekt.

– Ella sum tey siga á Reproz: Tað skal skora at arbeiða á Reproz, og tað krevur, at vit altíð eru best, sigur stjórin og brestur út úr at flenna. Hann er knappur í vendingini, og tað er skjótt millum ta gestikulerandi veipanina og tað stillføra smílið.

– Tey skulu elska at vera har. Tað snýr seg ikki bara um pengar. Sjálvandi skulu tey hava góða løn og góðar umstøður, men eisini førleikamenning, sigur ein heldur álvarsamari Christian, ið ikki heldur, at føroyskar fyritøkur sum heild gera nóg mikið við at menna síni starvsfólk. T.d. heldur hann, at fyritøkur eiga at gjalda fyri skeið og útbúgving hjá starvsfólkunum.

- Tú skalt fara við tínum starvsfólki, sum tú vilt, tey skulu fara við tær. Vit skulu menna tey og vera við til at satsa alla tíðina og aftur fyri fært tú tey bestu fólkini.

Christian heldur, at í einum heitum búskapi, har ringt er at fáa fólk, og har tað altíð er ov nógv at gera, er tað umráðandi, at ansa eftir, at fólkini ikki brenna út, tí tey skulu jú halda í 20-40 ár afturat, heldur enn bara 3 ár.

– Klára vit ikki at halda upp á ein persón, er tað mítt problem, staðfestir stjórin.

Christian leggur dent á, at í eini fyritøku er týdningarmikið við eini langtíðarætlan heldur enn impulsivum avgerðum. Tað er alneyðugt við eini strategi, visjón og misjón, fyri at ein kann røkka sínum málum.

Í hesum sambandi hevur Nema eisini orðað nøkur virði, sum fyritøkan skal arbeiða eftir. Virðini eru opinleiki, førleiki, áræði og passión, tvs. vit skulu lurta eftir okkara kundum, verða opin fyri input og samstørv og altíð menna okkara vitan, so okkara kundar altíð fáa ta bestu ráðgevingina, sum Christian tekur til.

Tað seinasta virðið, hann nevnir, er passión, og hetta ber ikki til at læra. Tí er neyðugt, at fólkini trívast, og nakrar ferðir um árið verða arbeiðsplássini í Klaksvík, Havn og Saltangará stongd, og bussar fara eftir starvsfólkunum, sum síðani hittast til starvsfólkadagar.

## Stirvin skúli

Tað eru tó ávísir grundleggjandi munir á USA og Føroyum, hóast Christian sum nevnt metir tað vera »loyvt« at tjena pengar í Føroyum í dag.

– Jantelógin er ikki til har yviri – tíbetur.

– Í Føroyum sigur man t.d., at hann er babbasa drongur, um onkur fer upp í eitt familjufirma. Í USA sigur man, at tað er fantastiskt, at onkur arbeiðir hjá sínum foreldrum og harvið er við til at víðari menna tað, sum foreldrini hava bygt upp.

Í hansara hugaheimi er ein amerikanisering positiv, hóast hann avgjørdur sigur, at tað hevur sínar fyrimunir at búgva í Føroyum.

Tá fotografurin spyr, um tað ikki er okkurt, ið kann gera hann í ringum lag, svarar hann nei.

Men eftir einari løtu, tá hann hevur hugsað seg um, má hann tó nevna eitt.

– Tað er so ikki veðrið. Men fólkaskúlin kann fá meg í ringt lag, sigur hann.

– Man sigur altíð, at tað eru børnini, sum tað er galið við, ikki lærarunum, sigur Christian, ið heldur, at føroyska fólkaskúlaskipanin ofta er stirvin, og at tað er heldur trupult hjá næmingum at fáa nøktandi avbjóðingar, av tí at øll skulu fylgjast.

## Verðin er stór

Sum nevnt er marknaðarføring ella branding eitt av lyklaorðunum hjá tí unga vinnulívsmanninum við teimum drúgvu royndunum. Í L.A. keypti hann eitt lýsingarvirki, sum burturav arbeiddi fyri urfirmaið hjá sær. Marknaðarføring ella branding er eisini ein av orsøkunum til, at Christian saman Rolf Herup Olsen og íløgufelagnum Løkir hevur arbeitt við at lagt tær seks fyritøkurnar saman, sum í dag eru í samtakinum Nema. Hann trýr nevniliga upp á, at innovatiónin verður best, tá ið KT-høvd og kreativ høvd verða sett saman, sum hann málber seg.

Enn er tó ikki heilt greitt, nær Nema ætlar sær út um landoddarnar. Tó nevnir Christian, at Nema longu hevur sett á stovn dótturfelag í Íslandi.

– Vit skulu fyrst gera fyritøkuna klára, sigur hann, og sipar til, at vit kunnu vit vænta at síggja enn fleiri fyritøkur undir Nema-samtakinum.

Hann himprast heldur ikki við at siga, at hóast føroyskar fyritøkur eru kappingarneytar á heimamarknaðinum, so kunnu tær vera væl og hjálpa hvørjari aðrari, tá ið tær fyrireika seg til marknaðin uttan fyri Føroyar.

– Verðin er so stór, at vit møtast ongantíð har úti.

*– Man sigur altíð, at tað eru børnini, sum tað er galið við, ikki lærarunum*

*– Tú skalt fara við tínum starvsfólki, sum tú vilt, tey skulu fara við tær*